# Hvar er hjálpin?

**Tað er altíð dramatiskt, tá eitt skip rennir á, men manningin kann ikki lastast fyri nakað. Hinvegin haldi eg ikki, at tað kann vera rætt, at ferðafólkið bara verður slept upp á fjall, tá skipið hevur lagt at og skal kannast**

TEISTIN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*


*Ferðafólkini sluppu at ganga fyri vág og vind, inn til Ternan kom tá klokkan nærkaðist tíggju*
*Mynd: Oskar Oskarsson*

Oskar Oskarsson var umborð á Teistanum í gjárkvøldi, tá skipið bar við land á Gomlurætt. - Sjálvandi er tað dramatiskt, tá eitt skip rennir á. Serliga tí veðrið var so mikið gott, og ferðafólkini stóðu og hugdu at, meðan skipið bara nærkaðist landi meiri og meiri.

Oskar Oskarsson greiðir frá, at tað vóru onkrar smágentur sum grótu og róptu eftir mammu, men at ferðafólkini fólkini fingu boð yvir hátalararnar um, at skipið hevði borðið við land, og at skipið fór at leggja at og fólkini skuldu sleppa í land. So gekk ein løta har onki meiri frættist, inntil at boð komu um, at bilførararnir skuldu fara niður á dekkið, og verða klárir at koyra í land. – Hesi boð gjørdi sjálvandi fólk bangin, tí onki meiri var sagt í hátalarunum, so úrslitið var, at øll tóku beinini á nakkan og sluppu sær niðurundir.

### Bíða í fleiri tímar

Oskar Oskarsson hevur ikki hug at lasta manningini umborð fyri nakað sum helst. – Tá slíkar støður eru, kemur panikkur í fólk líkamikið hvat. Men tað, sum eg sakni, er hjálpina á landi. Hvar var hon, spyr Oskar Oskarsson. Ferðafólkini fingu at vita, at eitt annað skip skuldi koma og sigla tey yvir um klokkan níggju, men so fingu tey heldur onki meiri at vita. Klokkan var farin nakað av hálvgum seks, tá ferðafólkini komu í land, og næsta skipið skuldi ikki koma fyrr góðar tríggjar tímar seinni. - Hví kemur ongin bussur eftir ferðafólkunum og koyrir tey til Havnar, har tey kunnu sita og fáa sær eina bita og tosa saman? Á Gomlurætt sluppu ferðafólkini at vála runt í fleiri tímar til næsti bátur kom, og tað kann ikki vera rætt, at skelkaðu ferðafólkini ikki skulu fáa betri viðferð, heldur Oskar Oskarsson, og fýlist hann á, at tilbúgvingin á landi er alt ov vánalig.

– Á Strandferðsluni fáa tey boðini um óhappið beinanvegin, og tá eiga tey samstundis at fara undir at gera okkurt fyri ferðafólkini beinanvegin, soleiðis at tey kunnu fáa ta hjálpina teimum tørvar, heldur Oskar Oskarsson, sum var umborð á Teistanum, tá hann bar við land í gjár.

## Ongin talutíð til korttelefonir

**Ongi talutíðarkort til korttelefonir eru at fáa í Havnini, og onki røkist fyri at hetta fer at broytast fyrr enn um tvær vikur. Á Føroya Tele eru tey hørm um hetta. - Feilurin er ikki okkara, men vit gera alt fyr at loysa trupulleikan**


*Ongin telefonkort til korttelefonir eru at fáa í Havnini*

TELEFONKORT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tey, sum ikki eiga eina fartelefon, men nýta korttelefonirnar, ið eru settar upp runt í Havnini, hava fingið ein trupulleika. Tey fáa ikki ringt, tí sum skilst eru ongi talutíðarkort til korttelefonirnar at fáa nakrastaðni í høvuðsstaðnum. Soleiðis hevur støðan verið seinastu tíðina, og soleiðis fer tað eisini at vera komandi tvær vikurnar.

Á Føroya Tele kenna tey til trupulleikan, og siga tey, at tey longu í februar bíløgdu fleiri talutíðarkort. – Vit hava langt síðani bílagt fleiri kort, men trupulleikar av ymsum slag hava gjørt, at vit enn ikki hava fingið nøkur kort. Feilurin liggur tó ikki hjá okkum, men hjá danska Xponcard. Kortini gera vit alt fyri, at trupulleikin verður loystur skjótast gjørligt, sigur Martin Brodersen, samskipari av marknaðardeildini hjá Føroya Tele.

Hóast tað er ógvuliga avmarkað, hvussu nógv brúka korttelefonir í dag, so hevur Føroya Tele vanligt eina rúgvu talutíðarkortum liggjandi. Men nú komu vit so í ta óhepnu støðu, at vit ikki hava nøkur á goymslu, og tað eru vit kedd um, sigur Martin Brodersen frá Føroya Tele.

Í meðan bíðað verður eftir talutíðarkortunum til korttelefonirnar, kunnu fólk keypa sær eitt simkort til eina fartelefon. Ein sovorðin pakki kostar 199 kr. og tá fylgja 100 kr. teletíð við. Hava fólk ikki fartelefon, so mugu læna telefonina frá øðrum, ella fara inn á eitt hotel ella okkurt líknandi og læna telefonina har, sigur Martin Brodersen á Føroya Tele, sum lovar, at um tvær vikur eru talutíðarkort aftur til at fáa til keyps.

## Teistin bar við land

**Klokkan hálvgum seks rendi strandfaraskipið, Teistin, á land við Gomlurætt. Talan er ikki um stóran skaða og kanningararbeiðið er í gongd, fyri at staðfesta hví skipið bar við land**

TEISTIN
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Seinnapartin í gjár, tá klokkan var hálvgum seks og Teistin skuldi fara av Gomlurætt til Skopunar, bar hann við land inni á havnini. Skipið megnaði sjálvt at sleppa leyst aftur, og legði seg so við bryggjuna, so at ferðafólk og bilar sluppu í land aftur.

Kanningar vístu beinanvegin, at sjógvur ikki var komin í skipið, men kortini varð gjørt av at taka Teistan upp á beding í Havn, fyri at kanna skipið nærri. Regin Vágadal, rakstrarleiðari hjá Strandfaraskip Landsins sigur, at tað beint nú ikki ber til at siga hvussu umfatandi skaðin er, men hann kann kortini siga so mikið sum, at talan er ikki um nakran stóran skaða. Á bedingini í morgun sást tó, at skipið hevur fingið tvey hol - annað á síðuna og hitt á kúlustevnið.

Regin Vágadal kann heldur ikki siga nakað um orsøkina til, at skipið bar við land, annað enn at kanningararbeiðið er í gongd, og at tíðindaskriv verður sent út seinni.

Í løtuni røkir Ternan siglingina fyri Teistan.


*Á bedingini í morgun umvaldu menn skaðan, sum Teistin fekk í gjárkvøldi*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

